*framhald av síðu 43*

Allir hesir 4 flokkar (miðfl. slapp upp í sandkassan seinni) hava hugna sær dúgliga við uttanlandsferðum til USA, Ísland, Noreg og Danmark fyri at vísa andlit til útheimin. Eisini ferðaðust teir dúgliga í fíggindalandinum Danmark, sum teir elska at ferðast til.

Hvør hevur goldið? – Tú gitti rætt, – tað gjørdi tú! – Tað var tí, tú ikki hevði ráð, heldur í ár, at fara at ferðast uttanlands. Kanska kunnu tit fara næsta ár, ella næsta. Tað veldst um, hvør ferðast fyrst, politikkararnir ella tú!

Hetta er tann fólkarepublikkin, tit hava longst eftir og trúð uppá í samfull 6 ár!

Hvat við at skifta trúgv?

Vel millum Kristus, Allah, Buddha ella antikrist o.m.a.

Nei, vit velja tað, sum vit kenna til! Er tað ikki Annfinn, sum øll hava vitað um, at hann framdi lógarbrot í síni tíð, so er eftir at velja Høgna, Høgna ella Pro Vita.

Tað er sum at velja ímillum pest ella kolera. Jenis av Rana, sum er lækni grøðir fólk við medisini til dagliga og á bønarmøtum grøðir hann við hondsálegging!

Mær vitandi var tað Jesus, sum gjørddi fólk á henda hátt.

Saman við Bill Justinussen hevur Jenis stovnað Miðfl., sum er at líkna við talibanveldi.

Teir fáa enntá 1 mió. av blokkinum, til at upplýsa ein óupplýstan skúlaungdóm um, at fosturtaka er dráp!

Ein fanatiskt religiøsur maður sum Thomas J. Askham er illur um, at danskir politikkarar blanda seg upp í, hvat føroyingar brúka blokkin til. – Vælsignaði maður, blokkurin er oyramerktur til heilsu-, almanna- sjúkrahúsmál – og ikki til Pro Vita!

Hvat danir brúka pening til, og hvønn teir stuðla, rakar ikki teg – tí teir gjalda sjálvir!

Tá tit fáa 1 mió. til upplýsing, kemur henda sama upphædd at mangla á einum ørðum øki. Nei, gjaldið sjálvir!

Velja tit Pro Vita, vil eg vóna, at føroyskir menn kunnu gerast við barn – men alt ber til í Føroyum, so hví ikki!

Vit neyðtaka allan Miðflokkin og siga við teir, at teir skulu elska hesi børnini, sum helst líkjast »pápanum«.

Hetta er at nýta sunt vit og skil! Sum at verða bumbaður aftur í tíðina.

Nú verður so aftur val tann 20. januar, og er hetta sum »ein gleðiboðskapur á jólum«.

Tað verður torført at finna eitt valevni í Føroyum, sum ikki er inhabilur einum ella øðrum føri. Mín bøn er tí, at tit kanna fortíðina hjá næsta løgmanni, tí hesin skal vera reinur sum kavi. Tað nyttar einki at sópa inn undir gólvteppið, tí sannleikin kemur altíð undan kavi fyrr ella seinni.

Maður ella kvinna í landsins hægsta starvi skal vera fyrimynd fyri ungdómin, ella trúgva tey bara, at alt ber til í Føroyum.

Høgni er inhabilur, tí hann er uppvaksin við hatri til alt danskt, hóast lunnarnir undir hansara virki vórðu lagdir í Danmark við útbúgving, so hann seinni kundi oyðileggja og mótarbeiða alt samstarv millum Føroyar og Danmark.

Gud viti, hvar hann hevur tað frá!

Gott val – og veljið nú við skili.

## Grand finale á Glyvrum :

# Valevni Tjóðveldisfloksins í Eysturoy

Valevni Tjóðveldisfloksins í Eysturoy skipa fyri endaspurti í valstríðnum í kvøld kl. 2000. Hendan grande finalan verður í Kappróðrarneystinum á Glyvrum.

Valevnini fara í stuttum at leggja floksins og síni politisku sjónarmið fram.

Umframt hetta verður felagssangur, livandi tónleikur við Jónsvein og Birgir og Kára Sverrissyni og eisini fer hin 87 ára gamli Petur Højgaard at hugleiða um flokkin og politiska stríðið fram ímóti teimum frælsu Føroyum.

Kaffi og burturluting verður.

Møti fjølment.

## VIÐMERKINGAR

# Áheitan á vágafólk

**Mannbjørn Jacobsen**

**Sjálvstýrisoyggj**

Mangt broytist á mansins ævi, sigur Gøtu Tróndur í Føroyingasøgu. Allar broytingar eru ikki góðar.

Fyri søguliga kunnug er ein syrgilig broyting við at henda í atkvøðumynstrinum í Vágum, triðju størstu oyggj í Føroyum, um ikki ikki samsvarandi lut í fólkatalinum í Føroyum.

Vágoyggin er týdningarmikil oyggj í Føroyum. Ongin menning búskaparliga og tjóðskaparliga politiskt kemur um oynna, umenn oyggin ikki er nevnd í Føroyingasøgu, einasta av teimum størru, møguliga er tað tí, at ekta vesturnorskt niðursetufólk búði her, við rótfestum siviliseraðum siðum, føroyingasøga er eftir hesi mynd keltiskar klanir í Føroyum á lægri menningarstigi, ættarsamfeløg, blóðhevn.

Tá vandamál hava verið frammi hevur oyggin verið í miðdeplinum. Løgið nokk annars. Fólkið er ikki serliga lokalpatriotiskt av náttúri, siðiligt, skinsamt, ein freistast at siga lítiðlátið, men er tað missvísandi. Onki lítilátni í álvara.

Seyðabrævið gevur fullan sjálvrætt, at seta hundatal, aðri pláss verður rátt fyri, aftur aðri verða sigandi vitnisburðir sagdir um fólkið, har býr. Hetta kundi bent á, at fólkið verður hildið vera álitandi. Onkur vildi hildið, at tað var tí løgmansgarðurin var har, ikki neyðugt tað.

Bátsbandið var brotið í Vágum, í Sørvági, av tiltikna gamla Dávur, sum tó ikki var vágamaður, men niðursetumaður frá Kvívík, í stóru uppgongdini í útróðrinum har í 19 andu øld.

Føroyska málið var latid lív laga av Hammarsheim frá Vágum, við gott nokk donskum foreldrum, løgmaninum tá. Men hann er føddur í og hevur búð nøkur ár í Sandavági, kendi seg sum føroying, tosaði málið natúrliga. Hansara mál, lært frá vøggu á løgmansgarðinum, er føroyska loyvda skriftmálið í dag, øvunda av fólki aðrastaðir úr Føroyum.

Stóra tjóð og náttúruskald føroyinga er Mikkjal á Ryggi, føddur í Midvági. Sangir hansara um lív og leik og dagligdag føroyinga fara altíð at fløða hjørtum føroyinga, fáa teir at rætta pannuna, umenn hann stóran part av lívi sínum, hevði eina lívsnoktandi lagnu.

Fólk úr Vágum hevur altíð verið at sæð frammaliga í búskaparligu og politisku menning okkara, um enn búskaparliga hevur róður verið tyngri, síðan kríggið serliga, nú arbeiðspláss verið politiskt sett, uttan atlit til annað, og búskapurin hevur verið stýrdur og goldin í stóran mun frá Danmark yvir sambandsflokkarnar.

Í 1946 var ungi vágatingmaðurin, Jákup í Jákupstovu frá Sørvági, eina maður millum amtstøðuna og loysingarmøguleikan. Uttan hansara støðutakan var helst onki loysingarmál.

Síðan kríggið, serliga frá 1960 og út, hevur støðugt afturgongd verið í sjálvstýrishuginum, tí danskir skúlar koma, nógv goldnir av dønum, sum spæla uppa siðiliga lagið í fólkinum, so tey óavvarandi geva vald yvir til persónar, sum aðri søgdu nei takk til. Einstaklingalyndið í týdninginum, sundurlyndið, orsakað av hjálandastøðuni, hevur møguleika í annars framfýsnum fólki. Hetta eigur nú at verða tikið upp og steðga, nú orsøk ikki er til tað longur so nógv.

At framhalda í ein undirgongsdal við aðru og triðju, um ikki fjórðu skiljing í fólkinum, framd á staðnum, av ótta fyri dagligdegnum, álokkað, óumhugsari sjálvgóðsku, eigur ikki at halda fram. Hetta hevur longu, og fer í størri mun at seta fremstu oyggj í Føroyum, til aftastu oyggj, drumbaoyggin, at samanbera við, at verða settur eftir í skúlaflokkin, við uppflyting. Tað merkist á vánaligu ídráttarúrslitunum, í syrgiligari samanbering, við teimum aftaná kríggið.

Ein virkningur er uppgeving av lívgevandi vanligu arbeiðsplássunum, til frama fyri heitar rullisessir. Her kundi vend komið í.

Besti máti, at rætta støðuni, er at rættað høvdið og styrkja sjálvstýrissíðuna nú 20. unda, tryggast at velja ein størri tjóðveldisflokk.

# 4000 krónur til ÍSB

Áhoyrararnir á Speakers Corner í gongugøtuni í Havn leygarmorgunin stuðlaðu væl tiltakinum, sum var til frama fyri ÍSB. Fyrireikarin, Hilmar Jan Hansen, sigur, at góðar 4000 krónur komu inn til ÍSB.

Nógv fólk keyptu kaffi og okkurt søtt afturvið, og fleiri lótu meira pening fyri kaffi og køkurnar, enn neyðugt var-alt fyri at stuðla vælgerðandi endamálinum.

Fyrireikarin takkar øllum stuðulinum og teimum, sum tóku undir við tiltakinum.




Haldarar hjá Sosialinum

ið ikki fáa leygardagsblaðið verða bidnir um at ringja tel 229725 leygardag millum kl. 11 og 14

Prentmiðstøðin

Sosialurin

www.sosialurin.fo

GSM telefonir

Nokia - Siemens - Motorola Ericsson - Panasonic

Tráðleysar

Siemens Dect. Kunnu ikki avlurtast

Til skip og bátar

NMT 450 - VHF telefonir v.m.

Storno SØLA & TÆNASTA

Handan Á 6 - 100 Tórshavn Tel. 314414 - Fax 318045





Skips Sosialurin

- TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK





**Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir**

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur

KAUPTHING Føroyar Virðisbrævameklarafelag

Tíðindablaðið Sosialurin Box 76 110 Tórshavn

ÓKEYPIS Sosialurin rindar postgjaldið

64

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis*

Navn á skipi:

Kontakt pers.:

e-mail:

Undirskrift:

**Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982 ella e-mail:** *skipssosialurin@sosialurin.fo*

☐ *Tekst útgáva*

☐ *HTML útgava ( uttan útskrift )*

☐ *HTML útgáva ( við útskrift )*

Sosialurin